# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Sitat úr onkrum blaðið ella sum onkur hevur sagt íð er við í einari grein hjá okkum í dag ella ein stuttur stu*

*Xxxxxxx Xxxxxxxx um okkurt*

## Kríggj í Miðeystri

Stríðið í Miðeystri tykist ongan enda at fáa. Tvørturímóti eru vit í hesum døgum vitni til, at stríðið millum ísraelar og grannar tess bara versnar. Tað eru hendingarnar seinastu dagarnar eitt ítøkiligt dømi um. Fyrst í Gaza, síðani í Libanon.

Spurningurin er nú, um hetta verður til veruligt kríggj - ella um talan ikki longu er um kríggj millum Ísrael og tvey av grannalondunum. Orsøkirnar eru nógvar, men tað, sum tendraði í fjúsið hesaferð, var avgerðin hjá militantum Hamasfólkum at taka ein ísraelskan hermann til fanga, nakað, sum síðani varð endurtikið av militantu Hezbollafólkunum í Suðurlibanon, ið tóku tveir ísraelskar hermenn til fanga. Hetta hevur fingið øði í ísraelar, sum nú í fleiri dagar hava bumbað Gaza og Libanon.

Tað er greitt, at Ísrael kann ikki liva við, at grannar tess áhaldandi skjóta rakettir inn á ísraelskt øki og taka ísraelskar hermenn til fanga til tess at fáa palestinar, her serstakliga Hamasfólk í ísraelskum fongslum leyslatin. Trýst elvir til móttrýst, og tað vita víðgongdu Hamasfólkini og nú eisini Hezbollafólkini. Í øllum hesum leikinum verða so sivil offur fyri áganginum og mótálopunum. Spurningurin er so bara, hvussu langt Ísrael kann loyva sær at fara, nú mong ósek og sivil bæði í Gaza og Libanon lata lív. Altjóða samfelagið hevur heitt á Ísrael um at vísa hógv, men ísraelska stjórnin tykist ikki vilja lurta.

Nú ávarar so eisini harðrendi og víðgongdi forsetin í Iran ísraelar. Um Ísrael heldur fram við sínum álopum og víðkar tey til Sýrialand eisini, so er hetta at meta sum ein krígsavbjóðing til øll muslimsku londini í Miðeystri er seinasta útsøgn hansara.

Vit eru við at nærkast eini støðu í Miðeystri, sum kann gerast vandamikil fyri heimsfriðin. Krúttunnan í Miðeystri er ein vending, sum oftani verður brúkt. Mangan hevur verið tendrað í fjúsið, men higartil hevur eydnast at forða fyri sjálvum endabrestinum. Spurningurin er, nær hon av álvara brestur.

USA, sum hevur tættast tilknýti til Ísrael, kann, um tað vil, forða fyri einum ragnarroki í Miðeystri. Tað krevur so aftur, at tess leiðsla vísir diplomatisk evni og initiativ, nakað, sum higartil hevur verið ein mangulvøra. Diplomati og vilji til samráðingar og semjur telur meira, enn mong geva sær far um. Vit hava m.a. sæð, hvussu væl eitt lítið land sum Noreg hevur dugað at roynt diplomati í verki í Miðeystri. Tað hevur USA nakað at læra av.

Hart ímóti hørðum, eygað fyri eygað hátturin førir so ikki endaliga á mál. Her má og skal annað til. Lyklaorðið er diplomati og aftur diplomati. Og her áliggur ikki minst hóvligu kreftunum í Ísrael og í grannalondunum og somuleiðis í USA ein stór uppgáva.

**Sosialurin**

# Føroysk oljuframleiðsla eitt stig nærri

**Bretskir myndugleikar hava góðkent útbyggingarætlan av tí næsta oljufeltinum, sum Atlantic Petroleum er partur av í bretskum øki**

ATLANTIC PETROLEUM

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Bretska ráðharrastovan fyri handil og ídnað hevur góðtikið útbyggingarætlanina fyri Ettrick oljufeltið í Norðsjónum, sum føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum er partur av. Henda góðkenningin merkir, at samstarvspartnararnir í loyvinum kunnu halda fram við sínum útbyggingarætlanum, sum miðja móti at framleiða fyrstu oljuna í 2008. Ettrick feltið varð uppdagað í 1981. Síðani hava fleiri avmarkingar- og metingarbrunnar verið boraðir. Oljukeldan verður bundin í eitt FPSO framleiðslu og goymsluskip, "Aoka Mitzu".

Wilhelm Petersen, stjóri sigur, at tey eru sera errin av at kunna kunngera aðru góðkenning av útbygging, sum Atlantic Petroleum er við í. Ì november í fjør var útbygging av einum øðrum felti, Chestnut góðtikið av myndugleikunum. –Framleiðslan frá hesum báðum oljukeldunum fer at skapa eitt virði til partaeigararnar hjá felagnum og fer harvið at slóða fyri framhaldandi menning av felagnum sigur stjórin í Atlantic Petroleum.

# Ólavsøkukórið fyrstu venjingina

KÓRSANGUR

Ólavsøkukórið hevur sína fyrru venjing í Kommunuskúlahøllini sunnudagini kl. 15.00 - 18.00. Á skránni eru í fyrsta lagi sangir at syngja á Tinghúsvøllinum ólavsøkudag: gamla ólavsøkukantatan hjá Jógvani Waagstein og Edvardi Mitens, birtandi sangir við tjóðskapardámi, og eisini verður við hesum væntiliga stóra kóri roynt at framføra megnarsatsin hjá danska tónaskaldinum Vagn Holmboe til yrkingina »Gandkvæði Tróndar« eftir J. H. O. Djurhuus, har operusangarin Ernst Sonsum Dalsgarð verður soloistur. Sangir til kórhugnaløtuna á Tinganesi aftaná verða somuleiðis tiknir við í venjingini.

- Ein og hvør er vælkomin í ólavsøkukórið; men umráðandi er, at øll, sum ætla at verða við á ólavsøku, møta til báðar venjingarnar, sigur Kórsamband Føroya.

ÚTOYGGJASTEVNA:

# Tunnutrillan – steðgast

**MARJUS DAM**
løgtingsmaður



### Ein heilsan til útoyggjabúgvar

Útoyggjastevna er hetta vikuskifti. Fái ikki møtt til hesa stevnu, av tí at eg skal seta Vestanstevnuna. Tað er spell at hesar stevnur skulu tørna saman og eg vóni ikki at tað hendir aftur.

Útoyggja viðurskiftir eins og útjaðarapolitikkur hevur altíð havt mín stóra áhuga. Seinastu árini eru álit skrivaði um hesi viðurskiftir. Gásadalur hevur fingið tunnilssamband – ið átti at komið fyri 40 árum síðani. Men gott er, at hendan er komin.

ÚTOYGGJAR FRÍTT:

Eg haldi, at øll fólk, ið búgva á útoyggj, skulu sleppa at ferðast frítt til /frá útoyggj antin við tyrlu ella báti/skipi. Hesi fólk skulu, ið mun til øll onnur her á landi, gjalda tveir ferðaseðlar fyri at koma inn á meginøkið: Ein ferðaseðil fyri at koma frá útoyggj til útjaðara. Ein ferðaseðil afturat fyri at koma frá útjaðara til meginøkið Streymoy ella Eysturoy.

Tað hevði ikki kosta landinum nógv, um ferðaseðlaprísurin var avtikin til útoyggj fyri fastbúgvandi á útoyggj í fyrstu atløgu. Møguliga kundi hann heilt verið avtikin fyri øll við skipið.

Oljuflutningur: Oljuflutningur við tunnum til útoyggj eigur stórt sæð at verða avtikin. Í Føroyum í 2006 er tíðin farin frá hesi foroldaðu flutningsskipan – sum tíverri stendur í fullum blóma á mangari útoyggj sum alternativ til at brenna torv ella sita í kulda.

Í miðøki hevur neyvan nakar sæð eina tunnu seinastu 40 árini. Á útoyggj er dagligur kostur at trilla oljutunnur til og frá lending.

Um skil ikki fæst á hesi viðurskiftir, so verður lógaruppskot lagt fyri løgtingið í heyst fyri at fáa hesi ótolandi viðurskiftir í rættlag.

Nógv onnur viðurskiftir eru at nema við. Allir føroyingar eiga at kunna búgva allar staðir í Føroyum

Undir áleið somu korum. Tað er tíverri ikki galdandi ídag. Tað er við til at køva útjaðara og útoyggj heldur enn at virka til menning og vøkstur. Tað kann nakað gerast við. Ikki bert tosa. Tí tá koma vit ongan veg. Nevndu 2 uppskot er eitt lítið fet tann rætta vegin – haldi eg. Men nógv annað skal eisini gerast.

Góða útoyggjastevnu.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.